# Fara at krevja revsiváttan

**Tvøroyrar býráð ætlar í framtíðini at krevja revsiváttan, tá ið fólk verða sett í starv. Tað skal í hvussu er gerast, tá ið setast skulu starvsfólk, sum hava við børn at gera**

Randi Jacobsen



*Tvøroyrar býráð ætlar, at starvsfólk í skúlum og í barnaansing skulu hava revsiváttan. Maud Wang Hansen, forkvinna í Føroya Pedagogfelag dámar einki, at ein starvsbólkur verður pilkaður burturúr*
savnsmynd

Mánakvøldið hevði Tvøroyrar býráð fyrru viðgerð av einum óvanligum uppskoti.

Uppskotið er at krevja revsiváttanir, tá ið kommunan setir fólk, og hetta skuldi vera galdandi fyri allar starvssetanir.

Men nú eftir, at uppskotið hevur verið fyri á fundi, verður tað helst til, at revsiváttan bara skal krevjast í sambandi við setan av starvsfólkum, sum hava við børn og ung at gera, á skúlum og í barnaansingini, væntar Malla Dam, varabýráðsforkvinna.

Uppskotið fær seinnu viðgerð á fundinum, sum verður 26. oktober.

Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri heldur tað ikki í øllum førum vera neyðugt við revsiváttanum í Føroyum, tí plássini eru so smá, at øll vita alt um øll. Men neyðugt er at tryggja seg, serliga tá ið starvsfólk skulu setast at abreiða við børnum og ungum. Tað kann altíð henda, at fólk uttan eftir søkja, og tá kann vera ilt at vita. Men tað ber ikki til at krevja revsiváttan bara frá summum.

Í Føroyum hevur higartil ikki verið vanligt at kravt revsiváttan í sambandi við starvssetanir, og ávísar treytir skulu lúkast, skal revisváttan krevjast.

### Sakligt og neyðugt

– Eftir persónsupplýsingarlógini skal kravið um revsiváttan vera sakligt og neyðugt, og ikki ber til at krevja fulla revsiváttan, sigur Rannvá Sólheim, ráðgevi á Dátueftirlitinum.

Til ávís størv kann tað vera sakligt at spyrja, um umsøkjarin hevur nakran dóm fyri fíggjarligt svik, men tað viðkemur ikki einum arbeiðsgevara, um ein umsøkjari til dømis hevur dóm fyri eitt nú at hava koyrt ov skjótt, sigur Rannvá Sólheim.

– Meginreglan er, at kravið skal vera sakligt og avgjørt neyðugt, sigur hon.

Aðrastaðni verður meira og meira vanligt at krevja revsiváttan fyri starvsfólk, sum skulu hava við børn at gera.

Dátueftirlitið skal ikki geva loyvi til kravið um revsiváttan, men fær Dátueftirlitið kæru frá onkrum, sum heldur tað vera órímiligt av arbeiðsgeranum at krevja revsiváttan, verður málið tikið upp.

### Persónlig váttan

Rannvá Sólheim veit bara nøkur fá dømi um, at revsiváttan hevur verið kravd í Føroyum. Onkuntíð hava fólk verið ímóti at útflýggjað revsiváttan, tí tey halda hana ikki vera neyðuga, men tey tora ikki at mótmæla, tí gera tey tað, verða tey útilokað frá at fáa starvið.

Revsiváttanin er persónlig, og viðkomandi, sum skal hava revsiváttan, fara hana frá politinum. Arbeiðsgevarin kann ikki sjálvur útvega sær váttanina.

# Mugu ikki kriminalisera pedagogar

**Kravið um revsiváttanir má umhugsast væl og virðiliga, og tað er ikki rætt bara at krevja revsiváttarnir frá pedagogum og hjálparfólkum, tí tað er at kriminalisera starvsbólkin, sigur Maud Wang Hansen, forkvinna í Føroya Pedagogfelag**

Randi Jacobsen

Tað er heilt burturvið glaðbeint at fara at krevja revsiváttanir í sambandi við starvssetanir.

Hetta heldur Maud Wang Hansen, forkvinna í Føroya Pedagogfelag.

– Sera umráandi er, at børn verða væl vard, hvar tey enn eru, og neyðugt er at hugsa seg væl um, áðrenn farið verður at biðja um revsiváttanir.

Henni dámar eisini lítið, tá ið tosað verður um at krevja revsiváttanir frá starvsfólkum á skúlum og í barnaansingini, tí tað er at kriminalisera henda starvsbólk.

– Hvussu við øllum teimum vaksnu, sum eru har, ið børn og ung ferðast. Skal revsiváttan verða kravd, mugu vit hava eina væl umhusaða og yvirornaða skipan, heldur Maud Wang Hansen.

Hon heldur eisini, at kravið um revsiváttan reisir nakrar etiskar spurningar, tí hvat liggur aftan fyri kravið, og hvussu kennist tað at skula útflýggja eina revsiváttan.

Maud Wang Hansen heldur tað bæði vera órættvíst og óneyðugt at krevja revsiváttan bara frá pedagogum og hjálparfólkum ella frá ávísum fakbólkum. Haraftrat gevur ein revsiváttan falska trygd, tí revsiváttanin tryggar bara móti teimum, sum hava onkran dóm.

- Vit eiga at umhugsa, hvør hugburður politiskt er til at krevja inn revsiváttanar og hvussu hetta skal fremjast, so tað veruliga verður talan um fyribyrging og ikki kriminalisering.

Annika Olsen, landsstýriskvinna er við at smíða lógaruppskot um hetta evnið, og Føroya Pedagogfelag hevur í tí sambandi biðið um fund við hana.

– Annika Olsen vil fegin hava góð ráð frá Føroya Pedagogfelag, sum arbeiðir fyri at tryggja børnini best, sigur Annika Olsen.